## Claus spældi aftur

Claus Bech Jørgensen hevur nú sitið 3 daga leikbann av sær, og hann spældi allar 90 minuttirnar, tá ið Blackpool spældi í næstbestu ensku deildini um vikuskiftið. Blackpool var á heimavølli ímóti Watford, og tað vóru gestirnir, sum fóru við øllum trimum stigunum. Watford vann dystin 2-0, eftir at støðan hevið verið 0-0 í hálvleikinum.



## Brøndby vann á Rosenborg

Í fjør vann Rosenborg á Brøndby í UEFA Cup kappingini, men tá liðin hittust aftur til venjingardyst um vikuskiftið, var tað danska liðið, sum vann norðurlendsku uppgerðina. Eitt mál kom í dystinum, og tað skoraði Jan Kristiansen fyri Brøndby. Brøndby hevur vunnið 8 av 9 venjingardystum, sum liðið hevur spælt í vetur.

Tjaldur-Kyndil 36-18 (14-7)

# Kyndil enn á frostmarkinum

**Tjaldur sigraði stórt á Kyndli, sum stendur til at seta søguligt botnmet við ongum stigi**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Heldur ikki ímóti Tjaldri á útivølli í Runavík brast fyri nev hjá Kyndli. Liðið er enn fryst fast í botnin við 0 stigum, og heldur ikki í høllini í Runavík var nakar ivi um, at heimaliðið fór at sigra stórt. Hagtølini vísa turt og kontant, at tjaldurskvinnur vóru akkurát duppult so góðar enn kyndlakvinnur, bæði í fyrra og í seinna hálvleiki. 14-7 vísti máltalvan, tá hálvtímin varð runnin, og 36-18 vísti máltalvan tá fullur tími var spældur, og løst og liðugt var.

### Kunnu fáa VB aftur

Á mangan hátt var talan um ein pliktsigur til Tjaldur, sum við at vinna hangipartíið ímóti Kyndli í annaðkvøld kann toga seg uppá liðina á VB við sama stigatali, 22 stigum. Munur var á leikferðini í hálvleikunum báðum. Bert 21 mál fullu í fyrra hálvleiki, meðan 33 mál fullu í 2. hálvleiki. Væl av skeivum sendingum vóru í dystinum, sum skemmaði hondbóltsdygdina nakað. Heimaliðið helt eina munandi hægri leikferð í 2. hálvleiki, og tær grønu úr Havn megnaðu als ikki at fylgja við, og endaði 2. hálvleikur eisini við einum greiðum 11-máls muni. Tjaldurskvinnur stóðu sterkar í verjuni, og var ringt hjá Kyndli at koma til orðanna. Kyndil royndi at koyra kontraálop, men tað riggaði stak illa hjá teimum. Hjá tjaldurskvinnum vóru tað ikki bara tær útlendsku, sum settu fingramerki á dystin. Adina Petrea fekk 10 mál fyri Tjaldur, men Heidi Sevdal fekk 8. Annika Thomsen og Alina Olaru fingu 5 mál í part.

Týskvøldið hevur Tjaldur so ein gyltan møguleika at gerast javnar við VB í stigum, og fara fram um Neistan. Kyndil, sum aftur stendur á hinara leikhálvuni burdu ikki fingið tjalduskvinnur at mist flogið, áðrenn grækarismessu.



**Tjaldur:** Adina Petrea 10, Heidi Sevdal 8, Alina Olaru 5, Annika Thomsen 5, Benadikta Johannesen 4, Jacoba Langgaard 2, Elinbjørg Hammer 1

**Kyndil:** Jacklin Djurhuus 9, Jórun Ludvig 3, Beinta Laursen 2, Barbara Egilstrøð 2, Helena á Krákusteini 1, Ása Christiansen 1

KÍF-Kyndil 26-20 (8-9)

# Kollfirðingar fingu botnfrádráttin

**Tað merkist á kollfirðingum og kyndlamonnum, at liðini eru langt burtur frá heiðurskrónunum.**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



Kyndil misti møguleikan fyri heiður og æru í steypafinaluni ímóti Neistanum, og KÍF hevur longi verið botnproppur. Kyndil liggur søguliga lágt í Atlantic Airways kappingini, og kundi tí ongantíð verða talan um ein dyst millum tvey toppmotiveraði botnlið. Kollfirðingar kundu kortini fegnast um tvey stig, sum kundu havt avgerandi týdning, um Team Klaksvík hevði eitt størro orð at siga í næstbestu deildini. Men so er ikki, og verða tey síðstu 4 leikumførini óivað drúgv at bíða eftir hjá liðunum, sum møttust í høllini í Kollafirði ígjár.

### Sást á spælinum

Tað kundi ikki undganga at smitta á leikdygdina, at medaljutokið er koyrt undan báðum liðunum. Men kollfirðingar áttu nakað meir í sær enn kyndlamenn, og eydnaðist tað eisini heimaliðnum at toga heim ein 26-20 sigur, og fingu teir sostatt botnfrádráttin ígjár. Liðini kunnu kortini koma at hava ávirkan á hvørji lið sleppa í FM-finaluna, og tað verður væl motivatiónsfaktorurin fram til 4. apríl, tá liðini spæla sínar seinastu dystir í hesum kappingarárinum. Bæði liðini hava H71, VÍF og Neistan eftir at spæla ímóti. Botnliðini kunnu spæla frítt, meðan tað stendur nógv uppá spæl hjá oddaliðunum. Kanska tað verður avgerandi í teimum seinastu dystunum hjá KÍF og Kyndli, sum eru liðug við sína millum uppgerðirnar í ár. Tey sum vóru eygnavitni til uppgerðina ígjár, vildu kanska sagt: - gott tað sama.

**KÍF:** Niklas Reginsson 6, Damir Oros 4, Regin Petersen 3, Rógvi Weihe 3, Hallur Hansen 3, Tony Weihe 2, Pætur D. Johansen 1, Teitur Joensen 1

**Kyndil:** Bárður Johannesen 7, Tummas Pauli Hanusarson 6, Torvald Abrahamsen 2, Andrias Sólsker 1, Hans Áki Dahl Christiansen 1, Rani Ellingsgaard 1, Jónleif Sólsker 1, Rói Lamhauge 1

Neistin-StÍF 36-22 (13-10)

# Neistin er enn við í FM-kvartettini

**Neistakvinnur vunnu tvey týdningarmikil stig ímóti StÍF í hørðu FM-kappingini við Stjørnuna, Tjaldur og VB**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Neistakvinnur syrgdi fyri at halda seg inni í FM-stríðnum, har háspenningur er millum tær, Stjørnuna, VB og Tjaldur um at røkka FM-finaluni. Neistakvinnur vunnu ein rættiliga trivaligan 36-22 sigur á StÍF, sum er einasta liðið í Sunsetdeildini, sum veit hvørja endastøðu tær fáa. Strandakvinnur eru ankraðar á 6 stigum, 6 stig frammanfyri Kyndil á jumboplássinum, og heili 14 stig upp til grannarnar frá eystara armi á Skálafjørðinum, Tjaldur, sum hevur 20 stig.

### Klassamunur í 2. hálvleiki

Neistakvinnur løgdu hart út, og sótu tær á øllum í byrjanini, men strandakvinnur høvdu eitt rættiliga gott tíðarskeið í seinnu helvt av 1. hálvleiki, og eydnaðist tað StÍF at halda munin niðri á trimum málum. Í 2. hálvleiki broyttist alt hetta. Neistin lat ongan iva verða um, hvat av liðunum hevur nakað at stríðast um, og serliga seinasta korterið var ein blá valdsdemonstratión. Tað jaliga fyri Neistan var, at málini blivu rættiliga væl fordeild millum spælarnar. Tordis Tróndarson, Trine Mayland og Elin Staksund skutu allar 5 mál í part. Neistin er framvegis eitt stig frá VB, men nú hava liðini fingið samband við Stjørnuna aftur. So fáa vit at síggja hvør spælir fyrstu og aðru violin í kvartettini hjá Neistanum, Stjørnuni, VB og Tjaldur tá avtornar 4. apríl.

**Neistin:** Elin Staksund 5, Trine Mayland 5, Tordis Tróndarson 5, Stine Mikkelsen 4, Annika Ljósstein 4, Heidi Maria Akselsen 3, Nicoleta R. Hansen 3, Rakul Augustinussen 1

**StÍF:** Lovisa Andreasen 6, Fríðrún Danielsen 5, Ninna K. Johansen 5, Rebekka Justinussen 3, Sunfríð Johansen 2, Anna Petersen 1